

*Sangarin í Nazareth, Dan McCafferty, hevði sum vera man sekkjapípuna við á pallin*

*Myndir Jens Kristian Vang*







# Droym víðari

**Nazareth spældi sum eitt ordligt rockorkestur, men tað vóru langar løtur millum stóru løturnar. Bólkurin manglaði stóru sangirnar, sum skulu bera eitt slíkt kvøld men kendar sangir fingu fólk í ríkiligt mát, tá ið Eyðun & Terji spældu**

NAZARETH
*Jonhard Hammer*
*jonhard@sosialurin.fo*

Teir umleið 600 áhoyrararnir til konsertina við Nazareth leygarkvøldið vóru heldur linligir, men fólk vórðu purrað út, tá ið tey bæði stóru hittini, Dream On og Love Hurts, rungaðu úr hátalarunum.

Annars var heldur leingi ímillum stóru løturnar á konsertini, sum varð hildin í ítróttarhøllini á Hálsi.

Nazareth er ein rockbólkur við 40 árum á baki, og teir spæla framvegis sum ein ordiligur rockbólkur. Sangarin Dan McCafferty hevur eina sterka rødd, hóast hann kanska er blivin eitt sindur hásari, enn hann var. Men hann kann framvegis lyfta eina framførslu hjá Nazareth, og hann var allatíðina í miðdeplinum.

Framførslan hjá Nazareth var góð, ljóðið var á góðari leið, men tað tóktist, sum at teir manglaðu stóru sangirnar, sum veruliga kundu bera kvøldið.

## Kendir sangir í langar banar

Kendar sangir fingu fólk í ríkiligt mát, tá Eyðun & Terji komu á pallin eftir konsertina við Nazareth. Nú var liðið meira út á kvøldið, og fólk vóru meira lívlig, tá sangir sum 80'ini, Dansa og Lívið er okkara gáta vórðu spældir.

Einki keyboard-spælari var í bólkinum hjá Eyðun & Terja hetta kvøldið, og tað gjørdi teirra framførslu eitt vet meira rockkenda – ivaleyst hóskandi til hetta kvøldið.

Eyðun & Terji hava nógv góðar sangir at taka av, og tónleikararnir Arnold Ludvig, Rógvi á Rógvu og Leivur Thomsen vóru rættiliga á heimavølli, tá teir spældu sangir hjá Føstufressum, og teir dugdu væl at seta ferð á, tá ið Eyðun Nolsøe sang sínar kendu poppsangir.

Kvøldið byrjaði annars við, at føroyski rockbólkurin Eager To Please hevði útgávukonsert, og hóast uppgávan hjá teimum var trupul – teir spældu tíðliga á kvøldinum, og áhoyrarafjøldin var ikki so stór – so gjørdu teir vart við seg.

Í øllum førum bæð sangarin í Nazareth fólk klappa fyri frálíka bólkinum Eager To Please, tá ið hann kom á pallin.